# Nýggjárskonsert fyri 7. ferð



**Aftur í ár varð skipað fyri nýggjárskonsert í Norðurlandahúsinum í Havn. Tríggjar framførslur vóru, og fyri fyrstu ferð keypti ein fyritøka eina heila framførslu. Tað var Eimskip, sum bjóðaði viðskiftafólki og starvsfólki á konsert leygarkvøldið**

NÝGGJÁRSKONSERTIN
*Stefan í Skorini*

Føroya Symfoniorkestur hevur sett sær fyri, at nýggjárskonsertin skal vera fastur táttur beint eftir nýggjárið í komandi tíðum. Fyrsta konsertin var í 1994.

Í ár vóru tríggjar framførslur. Umframt tvær sunnudagin var eisini ein leygarkvøldið. Tað var Eimskip, sum hevði keypt eina framførslu til viðskiftafólk og starvsfólk síni. Symfoniorkestrið fegnast stórliga um, at vinnan og mentanarligt virksemi kunnu samstarva sum í útlondum.

– Vit hava funnið okkara egna stíl á hesum konsertunum við løttum klassiskum tónleiki, solistum og kórsangi, sigur Pól Jákup Thomsen, sum leggur afturat, at fortreytin fyri at nýggjárskonsertini er samstarvið millum útvarpið, sjónvarpið, Norðurlandahúsið og Symfoniorkestrið, sum hevur riggað avbera væl.

Tilsamans hava eini 1050 fólk verið í Norðurlandahúsinum og hoyrt konsertina, og uppímóti 200 fólkum hava verið í gongd bæði á pallinum og handan leiktjaldið hvørja ferð.

Konsertin sunnukvøldið varð send beinleiðis bæði í útvarpi og sjónvarpi, so tað eru ein stórur partur av Føroya fólki, sum hevur hoyrt konsertina, og Pól Jákup sigur, at hetta er ein konsert fyri alt fólkið.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fleyr til gul av ymsum ættum, seinni av útnyrðingi. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum frostmarkið og 3 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av vestri og útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 1 og 4 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Hann veksur vindin upp í hvassan vind av útsynningi og yvirhøvur turt. Hitin millum 2 og 5 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av suðri og útsynningi , sunnudagin møguliga skrið. Stundum regn og hitin millum 4 og 8 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷10 |
| Nuuk | ÷7 |
| Qaqortoq | 1 |
| Ammassalik | ÷13 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | „3 |
| Seyðisfjørður | 0 |
| Tórshavn | 2 |
| Lerwick | 4 |
| Aberdeen | 5 |
| London | 5 |
| Tromsø | ÷2 |
| Bergen | 3 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 4 |
| Keypmannah. | 4 |
| Helsinki | 2 |
| Moskva | 0 |
| Berlin | 3 |
| Warzawa | 4 |
| Kiev | 6 |
| Bukarest | 3 |
| Paris | 3 |
| Madrid | 5 |
| Róm | 12 |
| Malorca | 12 |
| Athen | 18 |
| Malta | 19 |
| Tunis | 11 |
| Beijing | ÷4 |
| New Dehli | 9 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | – |
| Sydney | ø |
| New York | 1 |
| Miami | 21 |
| Los Angeles | 13 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | – |
| La Paz | – |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 27 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Hátrýstið sunnan fyri Ísland fer í landsynning.




Eitt lágtrýst tekur seg upp yvir Atlantshavinum á umleið 50N-30V og fer í landnyrðing og dýpist.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 08/01 kl. 06⁰⁰–09/01 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 1,9°
Minsti hiti máldur í jan.: ÷8,8° Mesti hiti máldur í jan.: 11,6°

### AVFALL




Avfallið: 0,3 mm – mált frá 08/01 kl. 06⁰⁰–09/01 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í januar: 71,6 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

9. jan.: Fullmáni
10. jan.: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 10. jan | 06:45 | 19:15 | 05:45 | 18:15 | 06:00 | 18:30 | 08:45 | 21:15 | 09:45 | 22:15 | 05:00 | 17:30 | 04:00 | 16:30 | 07:00 | 19:30 | 08:00 | 20:30 | 06:30 | 19:00 | 07:45 | 20:15 |
| 11. jan | 07:44 | 20:15 | 06:44 | 19:15 | 06:59 | 19:30 | 09:44 | 22:15 | 10:44 | 23:15 | 05:59 | 18:30 | 04:59 | 17:30 | 07:59 | 20:30 | 08:59 | 21:30 | 07:29 | 20:00 | 08:44 | 21:15 |
| 12. jan | 08:41 | 21:08 | 07:41 | 20:08 | 07:56 | 20:23 | 10:41 | 23:08 | 11:41 | – | 06:56 | 19:23 | 05:56 | 18:23 | 08:56 | 21:23 | 09:56 | 22:23 | 08:26 | 20:53 | 09:41 | 22:08 |
| 13. jan | 09:35 | 22:00 | 08:35 | 21:00 | 08:50 | 21:15 | 11:35 | – | 00:08 | 12:35 | 07:50 | 20:15 | 06:50 | 19:15 | 09:50 | 22:15 | 10:50 | 23:15 | 09:20 | 21:45 | 10:35 | 23:00 |

TURRIKLÆÐI
HÚGVUR
T-SHIRT
KEPPAR
og FLØGG



12. MAÐUR
http://soccer.at/faroes